betri trygging

November 2022

# Djóratrygging – Ketta

*Skjal við upplýsingum um tryggingina*

Henda kunningin veitir ikki allar upplýsingar um djóratryggingina. Tá skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú finnur nýggjastu tryggingartreytirnar á heimasíðu okkara www.betri.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600 og fáa nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

Djóratryggingin fyri kettu er ein djórasjúkutrygging. Tað merkir, at tryggingin fevnir um ávísar sjúkur og viðgerðir, sum eru nevndar í tryggingartreytunum.

## Hvat dekkar tryggingin?

**Djórasjúkutrygging fevnir um:**

- ✓ Tá kettan verður yvirkoyrd
- ✓ Beinbrot
- ✓ Tannskaðar
- ✓ Keisaraskurð
- ✓ Skurð fyri bróstkrabba
- ✓ Skurð fyri bløðrustein
- ✓ Skurð fyri knyklar
- ✓ Viðgerð fyri lívmóðurbruna (Pyometra)
- ✓ Viðgerð fyri svullir av álopi frá øðrum kettum
- ✓ Heilivág, sum verður latin á staðnum

## Hvat dekkar tryggingin ikki?

Her eru nøkur dømi um tað, sum djóratryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- x Sjúkur og skaðar, sum ikki eru nevnd í tryggingartreytunum
- x Fyribyrgjandi viðgerðir
- x Skaðar, sum ikki eru brádliga íkomnir
- x Tá brot er framt á almennar forskriftir ella leiðbeiningar frá djóralækna
- x Skaðin er orsakaður av grovum ósketni hjá eigara, ella at kettan kom ov seint undir djóralæknahond

## Eru avmarkingar í dekningum?

Her eru nøkur dømi um avmarkingar í dekninginum. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- ! Tryggingin fer úr gildi, tá kettan er 11 ár
- ! Tryggingin fevnir í mesta lagi um 3 skaðar um árið
- ! Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 10.000 fyri hvønn skaða.

## Sjálvsábyrgd

Sjálvábyrgdin er kr. 1.000.

## Hvar dekkar tryggingin?

Tryggingin dekkar allastaðni í Føroyum og fevnir um viðgerð hjá djóralækna í Føroyum.

## Hvørjar skyldur havi eg?

**Tá ið skaði hendir**

- Tú skalt boða okkum frá skaðanum skjótast gjørligt. Tað kann gerast á www.betri.fo, á tel 348 600 ella um kundaskipanina "Mín Trygging"
- Er kettan skadd ella sjúk, skal djóralækni kanna tað skjótast gjørligt og møgulig viðgerð skal fremjast beinanvegin
- Send okkum skjalprógv fyri viðgerðina hjá djóralækna skjótast gjørligt

**Tá ið broytingar eru**

- Tú skalt boða okkum frá, tá ið tú flytir bústað
- Skiftir kettan eigara, skulu vit hava boð um tað beinanvegin

## Nær og hvar gjaldi eg?

Tú kanst gjalda árliga ella mánaðarliga.
Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu.

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, um ikki annað er avtalað í tryggingarskjalinum. Hon heldur sjálvvirkandi fram, um hon ikki verður uppsøgd.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tú kanst siga tryggingina upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

Somuleiðis kanst tú siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um tú gert tað innan 14 dagar eftir, at ein skaði er útgoldin ella avvístur.